# Minningarorð um Ingu



Hendan lagna gjørdist okkum tung
Tú sum mátti fara so ung
Harrin teg tók
So at tað kendist sum á uttastu rók

Ferðin ei gjørdist long
Áðrenn tú hvíldi í tíni song
Men tað tú kláraði at náða
Var ikki at forsmáða

Tú hevði eitt livandi heim
Sum vit minnast við gleði og gleim
Hjá tær var altíð ein hjálpandi hond
Um tað so var millum lond

Tú lærdi okkum at verja
Og okkar liðfelagar upphevja
Hvar vit enn leiktu
Tú okkum uppkveikti

Ein so sterkan vilja
Ið fáur mundi skilja
Hvør leikur skuldi vinnast
Tað lá við hjarta títt innast

Minnini við tær
Tey eru mær so nær
Vit kunnu frøast um tað vit høvdu saman
Og allar tær løtur við gaman

Tú setti tær mál
Og rakk tey við lív og sál
Av tær vit mugu læra
Og minnast tað kæra

Tú fórt gjøgnum lívið við høgari ferð
Og mátti brátt úr hesi verð
Hóast tú lá á deyðastráð
Tú vøkur vart at líta á

Til tína líðing
Er torført at finna nakra týðing
Tú ert fyri okkum ein hondbóltsmynd
Ið rakk upp á mangan tind

Stórur saknur er í tær
Serliga hjá teim, ið stóðu tær so nær
Men vit mugu halda á
Tað mugu vit at sjá

***Gunnleyg***

## Tøkk

Hjartaliga takka vit øllum, sum sýndu samkenslu, tá ið kæri pápi, verpápi, abbi og langabbi okkara

**Haldor Sigurðsson**
andaðist og varð jarðaður.

Hjartaliga takk til tykkum øll, sum á ymiskan hátt hjálptu til við jarðarferðini.

Takk fyri blómur og kransar, og tøkk til øll, sum fylgdu honum til hansara seinasta hvíldarstað.

*Vegna familjuna*
**Eyð, Ann og Siw**

## Tøkk

Hjartaliga takki eg tykkum mongu, sum mintust meg á 80 ára degnum við bæði gávum, blómum, uppringingum og vitjan.

Bestur heilsanir
**Pauli Joensen, Sandvík**

†

Kunngjørt verður fyri ætt, vinum og kenningum, at elskaði maður, pápi, verfaðir, abbi og bróðir okkara

***Johan Joensen***

andaðist á Landssjúkrahúsinum 14. apríl, 63 ára gamal.

Jarðarferðin verður hósdagin 18. apríl kl. 13.00 úr Havnar kirkju.

*Fyri tey avvarðandi*
**Nancy, Sólrun, Jan og Jón**




www.sosialurin.fo







## Minningarorð um
# Jógvan Z. Joensen,
## bónda í Fuglafirði

Orðatakið sigur, at deyðin hyggur ikki at tonnunum. Hetta máttu vit eisini sanna tann 20 mars í ár, tá Jógvan Z. Joensen bóndi í Fuglafirði, í bestu árum og í sínum dagliga yrki, mátti lúta fyri lagnuni. Tað nívir okkum øll, sum kendu Jógvan, og tað er við djúpastu samkenslu við foreldrum, systkjum og teirra, at vit skriva hesi fátæku minningarorð.

Jógvan hjá Fritleif, sum vit vanliga róptu hann, tók við festinum aftaná pápan í 1982, bert 26 ára gamal. Hann var av raskastu monnum og hevur rikið garðin fyrimyndarliga. Hann var eisini ein virkin maður – virkin sum bóndi, og virkin í felagsarbeiði saman við sínum lagsbrøðrum. Jógvan troðkaði seg ikki framat, men á sín stillføra og hóvliga hátt, setti hann sín persónliga dám á, allastaðni har hann var. Hann var skemtingarsamur í veitslulag og visti manga góða søguna. Á ungum árum var Jógvan nevndarlimur í Føroya Búnaðarfelag, og í 1991 bleiv hann valdur í nevndina í Meginfelag Búnaðarmanna (MBM), har hann sat út í eitt, til nú hann doyði. Hann var formaður tvey skifti, frá 1993 til 1994 og frá 1998 til 2000. Seinastu tvey árini var hann næstformaður.

Ikki liggur altíð líka ræði at fáa nevndararbeiði at glíða uttan trupulleikar. Jógvan hevði sínar meiningar, og hann segði eisini tað, hann meinti, men so hevði hann tey vælsignaðu evni, at kunna slaka og rætta hondina fram, tá semjur skuldu søkjast. Tær meiningar hann hevði, og tær avgerðir, hann var við til at taka, høvdu altíð tað mál, at hetta skuldi gagna felagnum og tess limum. Jógvan hevur dugnað føroyskum bøndrum og jarðarbrúki væl í sínum alt ov stutta lívi.

Tað er okkara vón, at tit, sum stóðu Jógvani nær, mugu fáa ta eyka styrki, sum skal til fyri at bera hesa tungu byrðu, sum er løgd á tykkara herðar í hesum døgum. Vit, sum dagliga hava okkara gongd í føroysku náttúruni, vita, at sjálvt aftaná ringasta kavarok og gellifrost, kemur sólin framaftur, fjálgar fólk og fæ, tiðnar frostið og gevur lív til ta minstu blómu. Veri hetta eisini tykkara troyst.

Friður veri við minninum um valamannin Jógvan hjá Fritleif.

***Vegna starvsfelagar og limirnar í Meginfelag Búnaðarmanna (MBM)***

***Rólvur Djurhuus, nevndarformaður***






# Eitt frítt vinnulív

Ábyrgdarkensla og avgerðarrættur eru hornasteinar í einum frælsum vinnulívi. Hetta er grundsjónarmið, sum Sambandsflokkurin byggir sín politikk á.

Søgan hevur lært okkum, at vinnulívið á landi og sjógvi hevur bestu gróðrarlíkindi, um menniskjaliga hugflogið fær fríar ræsur.

Sambandsflokkurin vil veita vinnulívinum fríari umstøður at mennast. Tess fríari ræsur vinnan hevur, tess betur verður hon før fyri at menna seg sjálva og harvið samfelagið.

Tað almenna eigur at halda seg burtur frá vinnulívinum. Almennur stuðul til privat virki avskeplar kappingina, fremur óvirkni og eggjar til skeivar íløgur. Almenni leikluturin skal avmarkast til at gera lógir, ið skapa vinnuni góðar karmar ella eru neyðugar til at verja onnur samfelagsatlit.

Við Sambandsflokkinum fær vinnan fríari teymar.

**Sambandsflokkurin**
**- gott samstarv**

B